LM-053/2022

Fylgiskjal 4

Kommunufelagið

Uttanríkis- og Vinnumálaráðið
Gongin 7
Postboks 377
110 TÓRSHAVN

Dagfesting
22. februar 2023

Okkara j.nr.
23/00923-4

Málsviðgeri
Janus Haraldsen

Tygara j.nr.
22/18081

Viðv. U.t.ll. um grundvatn

Uttanríkis- og vinnumálaráðið sendi 26. januar 2023 omanfyrinevnda uppskot til ummælis. Kommunufelagið hevur viðgjørt málið á stýrisfundi 17. februar 2023 og hevur hesar viðmerkingar til uppskotið.

Lógaruppskot á týðandi økjum hjá kommununum mugu viðgerast í felag

Kommunufelagið skilir, at hetta lógaruppskotið hevur verið ávegis í rúma tíð orsaka av at avvarðandi landsmyndugleikar hava staðfest ein tørv á neyvari regulering av hesum øki. Vit eru ikki ósamd í hesum og kvitta fyri, at arbeiðið er sett í verk og at eitt uppskot nú fyriliggur.

Samstundis vilja vit vísa á, at hetta uppskotið – á fleiri mótum – nertir við sera týðandi áhugamál hjá kommununum. Kommunurnar hava púra eyðsæð eina servitan á hesum øki og hava nógvar av praktisku uppgávunum um hendi. Hetta má hava verið landinum greitt, tá ið farið varð undir tilgongdina.

Í slíkum føri eigur landsstýrið sjálvsagt av sínum eintingum at taka felag okkara við í lógararbeiðið frá byrjan. Vit harmast tí almikið um, at hetta ikki er hent.

Á fundi við nýggja landsstýrið hava vit fingið váttan um, at kommunurnar í størst møguligan mun verða tiknar við í viðkomandi arbeiði, sum landsstýrið fer at seta í verk. Hetta fegnast vit um og vóna tí, at mannagongdin í samband við hetta lógaruppskotið ikki fer at vera endurtikin.

Vatn sum tilfeingi er annað enn grundvatn

Kommunurnar hava søguliga átikið sær alla uppgávuna og flestu útreiðslurnar av at tryggja nóg mikið av dygdargóðum vatni til borgarar og vinnulívið í sínum økjum.

Vatnveitingin er sostatt vorðin ein av grundleggjandi tænastunum hjá kommununum. Ein tænasta, sum saman við øðrum er ein av fortreytunum fyri menning og útbygging av lokalsamfelagnum, og sum tískil eisini fær høga raðfesting.

Landa- og jarðfrøðiligu viðurskiftini kring landið eru tó ymisk. Fleiri kommunur liggja soleiðis fyri, at nógv grundvatn er til. Nøgdin av vatni er at kalla ótømandi, og sjálvt større øking í tørvinum gerst ein lutfalsliga lagalig uppgáva at nøkta. Aðrar kommunur hava hinvegin støðugar avbjóðingar og dúva í større mun uppá vatn úr erva, sum savnast í ávum og løkum.

Okkara fatan er, at vatnveitingin er so grundleggjandi fyri okkara samfelag, at tað ikki má vera ivi um framíhjárættin til tilfeingið til hesa veiting – eisini framum onnur áhugamál. Tá ið farið verður undir at regulera hetta tilfeingið, so er tað rættast um somu leið at breiðkað sjónarhornið og tryggja samfelagsliga gagnnýtslu av øllum slagi av vatni – eisini tí, sum kemur úr erva.

Kommunufelagið mælir tí til at lógin verður víðkað til eisini at fevna um vatn, sum kemur úr erva og sum savnast í lendinum. Greiðar ásetingar eiga í hesum sambandi at gerast um framíhjárættin hjá kommununi at brúka alt slag av vatni til kommununalu vatnveitingina. Somuleiðis mugu ásetingar vera, sum á munagóðan hátt forða fyri at inntriv ella annað kunnu gerast á ein hátt, ið ger seg inn á møguleikarnar hjá kommununi at fáa til vega hetta tilfeingið.

Fráboðan heldur enn loyvi til kommunala gagnnýtslu *(§ 3)*

Lógaruppskotið leggur upp til at kommunurnar framyvir skulu søkja um loyvi at gagnnýta vatn í teirra øki. Hetta skal bæði vera galdandi tá ið talan er um gagnnýtslu av grundvatni til ta kommunalu vatnveitingina, til orkuframleiðslu og onnur almannagagnlig endamál.

Grundgivið verður ikki fyri, hví landið skal seta í verk hesa loyvisskipan. Tá ið til stykkis kemur, so eru hesar helst eisini fáar, tá ið tað um kommunurnar umræður. Kommunurnar eru sostatt – og hava altíð verið – størsti gagnnýtari av vatni her á landi. Serfrøðin á hesum øki er tí hjá tí kommunala í nógv større mun enn hjá landinum. Nógv verður eisini lagt fyri at tryggja, at veitingarnar eru bæði støðugar og dygdargóðar.

Kommunufelagið kann als ikki taka undir við, at kommunurnar skulu umbiðja landið um loyvi at gagnnýta vatn í teirra øki. Hetta hevur altíð verið ein staðbundin raðfesting og skal framhaldandi vera tað.

Kravið í verandi líki fer einans at bera í sær óneyðuga eyka umsiting hjá landi og kommunum. Hetta hóast tað valla kann vísast á dømi, har kommunan ikki átti at fingið slíkt loyvi. Alt annað líka fer tað eisini at bera í sær seinkingar av arbeiðum, sum javnan hava skund at fáa undir land og har stór samfelagsvirði kunnu vera uppá spæl.

Kommunufelagið skilir tó, um landið hevur eitt ynski um at skapa eitt landsfevnandi yvirlit yvir, hvagar drekkivatnsgagnnýtsla, orkuframleiðsla og annað tílíkt fer fram kring landið. Er hetta ynskiligt, so verður mælt til at broyta loyviskravið til eitt krav um, at kommunan fráboðar avvarðandi myndugleika um ta gagnnýtslu sum fer fram í teirra øki.

Landið skal ikki hava framíhjárætt *(§§ 2-3)*

Lógaruppskotið gevur landinum ein framíhjárætt at gagnnýta grundvatn. Grundgivið verður ikki beinleiðis fyri hesum, men hetta hongur ivaleyst saman við, at man sambært uppskotinum metir grundvatn sum ráevni í undirgrundini – ið tískil ikki eigur at vera ogn hjá (meiri og minni tilvildarligum) grundeigarum.

Kommunufelagið skilir, at landið við hesi grundgeving eigur at hava framíhjárætt framum privatar grundeigarar og vinnurekandi. Kommunufelagið kann tó ikki góðtaka, at landið skal hava framíhjárætt framum kommunurnar.

Eftir okkara tykki ber heldur ikki til at grundgeva haldgott fyri, at kommunan skal víkja fyri landinum í hesum høpi. Endamálið við at fáa grundvatn til høldar sum tilfeingi fer ivaleyst altíð at vera ein staðbundin gagnnýtsla. Í tí sambandi eigur og skal landið hava álit á, at kommunan er før fyri at gera skynsamar raðfestingar og tryggja bestu gagnnýtslu av tí tilfeingi, sum er í hennara øki.

Kommunurnar eiga lut í møguligum tilfeingisgjaldi *(§ 5, stk. 4)*

Landsstýrismaðurin fær eftir lógaruppskotinum loyvi at áseta gjøld fyri loyvi at gagnnýta grundvatn. Í viðmerkingunum verður sagt, at talan bæði kann vera um gjald fyri sjálva loyvisviðgerðina, eins og gjald kann verða tikið fyri rættin at gagnnýta vatnið. Víst verður á, at hetta er sama skipan, sum er galdandi í alivinnuni.

Kommunufelagið skilir hetta sum eitt nýtt slag av tilfeingisgjaldi, sum landsstýrismaðurin kann seta í verk.

Talan er í hesum føri um eitt staðbundið tilfeingi, og tí eigur lutur í hesum at fella til einstøku kommununa ella til kommunurnar sum heild – eftir nærri samráðing við okkum í kommununum. Hetta eigur lógin at heimila.

Kommunufelagið leggur í hesum sambandi eisini til merkis, at landsstýrið sambært samgonguskjalinum vil geva kommununum lut í tilfeingisgjaldinum í alivinnuni. Hetta er sama skipan, sum víst verður til í lógaruppskotinum, og tí mugu somu grundgevingar gera seg galdandi í mun til at tryggja kommununum lut í møguligum nýggjum tilfeingisgjøldum.

Í sama viðfangi eigur at umhugsast at gera munandi greiðari eftir hvørjum aðalreglum hetta gjaldið ætlandi skal ásetast. Uppskotið hevur sum er onga vegleiðing til, hvussu gjaldið skal ásetast, og tað er neyvan ynskiligt og lítið brúkiligt. Kommunufelagið hevur ikki førleikar at meta um, hvussu eitt tílíkt gjald kann ásetast, men vil vísa á, at kommunalu felagsskapirnir Sev og Fjarhitafelagið hava allar førleikar at meta um virðið av hesum tilfeingi undir ymsum fortreytum.

Onki loyvi uttanum kommununa *(§ 4)*

Landsstýrismaðurin fær eftir uppskotinum heimild at geva loyvi til ymsa vinnuliga gagnnýtslu av grundvatni. Ongi krøv eru um at kommunali myndugleikin á staðnum verður tikin við uppá ráð í hesum sambandi.

Kommunufelagið minnir á, at ein av fremstu uppgávunum hjá kommununum er at leggja til rættis, hvussu bygt verður í økinum. Kommunurnar hava vanliga eisini nógvar ætlanir, sum enn ikki eru komnar so langt at tær kunnu gerast almennar ella skrivast inn í viðkomandi byggisamtykt.

Tað er ómetaliga óheppið, um landið fær heimild at gera egnar raðfestingar á kommunalum øki uttanum kommunala myndugleikan. Um illa vil til, so kann hetta gera tað ógjørligt ella óneyðuga kostnaðarmikið at gjøgnumføra ætlanirnar hjá kommununi.

Tí eiga øll loyvi frá landinum at vera treytað av góðkenning frá kommununi. Mælt verður til at heimildin hjá landsstýrismanninum verður tillagað samsvarandi, soleiðis at ongin ivi er um hesi viðurskiftini.

Kommunufelagið kann leggja afturat, at júst sama konstruktión er kend millum land og kommunur í øðrum høpi. Landsverk hevur sostatt víðar heimildir at ávirka ella steðgað bygging á kommunalum øki, um hetta eftir teirra tykki ger seg inn á áhugamálini hjá landinum. Júst somu heimild eiga kommunurnar at fáa í hesum høpi.

Leikluturin hjá Sev og Fjarhitafelagnum

Lógaruppskotið tykist í verandi líki ikki fyrihalda seg til, at vit í Føroyum hava tveir kommunalar felagsskapir sum á ymsan hátt fáast við orkugagnnýtslu av vatni. Eftir listanum av beinleiðis hoyringspørtum at døma hevur man av onkrari orsøk heldur ikki tikið hesar felagsskapir við.

Vit meta tí veruligan vanda vera fyri, at hetta lógaruppskotið kann hava neiligar ávirkanir á hesar felagsskapir, sum vit øll so ella so líta á til samlaðu orkuframleiðsluna í Føroyum. Hetta er ikki ein óvissa, sum eftir okkara tykki kann góðtakast. Vit fara tí staðiliga at mæla landsstýrinum til alt fyri eitt at gera sítt til at tryggja at kommunalu felagsskapirnir verða tiknir við uppá ráð, soleiðis at hetta uppskotið ikki ger seg inná teirra virksemi.

Óvissur um verandi boringar

Sum flestum kunnugt eru ein røð av boringum longu gjørdar kring landið. Nakrar av teimum eru serliga áhugaverdar í mun til hita-/orkugagnnýtslu. Sum vit lesa uppskotið tekur hetta tó

ikki støðu til verandi boringar – altso, um heimild verður at gagnnýta hetta vatnið eftir hesari lógini.

Kommunufelagið hevur ilt við at síggja, hví hendan lógin ikki eisini skuldi fevnt um verandi boringar – serliga tá ið hugsað verður um, at landsstýrið metir grundvatn sum eitt ráevni. Mælt verður tí til at uppskotið eisini fært virknað fyri verandi boringar og aðrar boringar, sum verða gjørdar áðrenn gildiskomu.

Ognartøkuheimild má eisini fevna um kommunur *(§ 10)*

Lógaruppskotið gevur landsstýrismanninum heimild at "... *ognartaka lendi til útbúnað o.a., sum er neyðugt fyri at gagnnýta grundvatn.*"

Heimildin fevnir als ikki um kommunurnar.

Lógaruppskotið tekur heldur ikki í viðmerkingunum støðu til, um tað verður mett, at heimildirnar í býarskipanarlógini (ll. nr. 13/1954) kunnu brúkast í mun ognartøku til grundvatnsgagnnýtslu.

Kommunufelagið metir tað ikki vera nøktandi, um kommunurnar skulu dúva uppá ognartøkuheimildir í aðrari lóggávu. Vit meta tað somuleiðis ivasamt, um heimildirnar í býarskipanarlógini kunnu nýtast til ta ognartøku, sum krevst til aðra gagnnýtslu enn til kommunalu veitingarnar.

Kommunufelagið mælir tí staðiliga til, at § 10 verður víðkað soleiðis at kommunustýrið eisini fær heimild at ognartaka eftir lógini, og at hendan ognartøkuheimild verður javnsett heimildini hjá landsstýrismanninum.

Ivamál um kæru og revsing *(§§ 11-12)*

Kommunufelagið skilir lógaruppskotið soleiðis, at landsstýrismanninum skal vera loyvt at skerja kærumøguleikarnar heilt burtur. Hetta er eftir okkara tykki brot við vanliga siðvenju har avgerðir kunnu kærast til hægri myndugleika. Tað er undrunarvert, at uppskotið ikki lýsir nærri, hví hendan avmarking er neyðug.

Viðmerkjast skal í hesum sambandi, at møguligar ósemjur millum land og kommunur eru ósemjur millum myndugleikar. Tað er ikki nøktandi fyri okkum, um landsins myndugleiki í slíkum førum fær heimild at taka endaligar avgerðir. Kommunufelagið mælir tí til at lógaruppskotið tryggjar at allar ósemju millum land og kommunur kunnu kærast, t.d. til Føroya Kærustovn. Sama rættin eiga borgarar og vinnurekandi at hava.

Kommunufelagið

Viðvíkjandi revsiásetingini kann tað undra, at ongin avleiðing tykist vera av at fara fram uttan loyvi – og at revsing bert verður heimilað at taka burtur, avlaga ella løsta merkingar og annað.

Viðmerkjast skal at tey nevndu revsiverdu viðurskiftini helst í mestan mun longu eru fevnd av ásetingum í revsilógini (t.d. § 291 um herverk). Hinvegin er ongin revsing ella onnur avleiðing av at fara fram uttan loyvi. Harvið tykist einasta amboðið vera at seta í verk fútabann, um slíkt fer fram. Kommunufelagið metir tí, at hesi viðurskifti eiga at vera greinaði nærri, herundir um tað eigur at kunna gerast eitt løgreglumál um farið verður fram uttan loyvi.

Vit vóna at omanfyrinevndu viðurskifti fáa jaliga viðgerð í landsstýrinum, áðrenn uppskotið verður borið í løgtingið.

Vit loyva okkum somuleiðis at ganga út frá, at viðkomandi løgtingsnevnd kallar felagið inn til hoyringar, tá ið tíðin er búgvin til tess.

Vegna
Kommunufelagið

Tórbjørn Jacobsen
formaður

Eyðun Christiansen
stjóri